# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Høgni Hoydal 40 ár



Í dag, týsdagin 28. mars, verður Høgni Karsten Hoydal í Hoyvík 40 ár. Høgni hevur seinasta tíggju ára skeiðið verið í fremstu røð her á landi. Sum tíðindamaður í Sjónvarpinum og síðani sum politikari og formaður í Tjóðveldisflokkinum.

Høgni er føddur í Keypmannahavn. Foreldrini eru Gunnvør og Kjartan Hoydal. Mamman er lívfrøðingur, og pápin er fiskarílívfrøðingur.

Høgni vaks upp í Hoyvík, og hann er hoyvíkingur við stórum H. Í 1987 leyk hann HF prógv í Hoydølum. Tvey ára skeiðið undan HF tíðini royndi Høgni sjólívið sum dekkari við eitt nú Ólavi Halga, ið var vaktarskip, og sum grótlagari, og árið eftir HF tíðina var hann í eitt ár vikarur í Eysturskúlanum.

Í 1988 fór Høgni undir víðari lestur á Roskilde Universitetscenter. Har leyk hann í 1994 embætisprógv í søgu og samskifti. Í lestrartíðini royndi Høgni í summarfrítíðunum arbeiði í fiskivinnuni.

Høgni fór tíðliga at spæla hondbólt í H71, sum blaðungir hoyvíkingar høvdu stovnað, og hann royndi seg aftur sum hondbóltsspælari í fremstu deildini, eftir at hann var komin aftur til Føroya. Longu áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa, hevði hann verið kassameistari í H71. Undir lestrinum var Høgni virkin í útisetalívinum í danska høvuðsstaðnum. Eitt nú var hann ráðslimur og skrivari í MFS.

Útisetatíðin hjá Høgna var liðug, tá ið sjøtul var settur á upptøkuna eftir kreppuna í Føroyum. Tá ið Høgni fekk høvi at royna seg í Sjónvarpinum, royndi hann seg á øllum hugsandi økjum – eitt nú sum ítróttarfrásøgumaður. Men tað var fyrst og fremst búskapurin og politikkurin, sum arbeiðstíðin fór til. Stóri spurningurin var partabrævaumbýtið í bankunum og endurreisingin av Føroya Banka. Serliga varð fokus sett á leiklutin hjá donsku stjórnini, Fíggjareftirlitinum og Den danske Bank.

Umframt ein rúgva av innsløgum í Degi og viku, sum vóru við til at seta dagsskránna í politiska orðaskiftinum, spurdust nakrar sonevndar dokumentarsendingar burturúr. Tær vóru við til at seta eld í, soleiðis at bankakanningin varð gjørd.

Tað vóru tó heilt onnur viðurskifti, sum vóru orsøk til, at Edmund Joensen skrivaði út nýval til Løgtingið at vera 30. apríl 1998. Tað kvøldið, tá ið valið var útskrivað, var Høgni Hoydal vertur fyri sjónvarpsorðaskifti millum floksformenninar, og hann tóktist skula vera ein av teimum, sum skuldu hava ábyrgdina av valstríðnum fyri Sjónvarpið.

Tjóðveldisfólk í Suðurstreymi vildu hava ungar kreftir á listan, og eftir fleiri áheitanir um at stilla upp, tók Høgni av. Hann gjørdist oddamaður í valstríðnum, og úrslitið hjá Tjóðveldisflokkinum varð betri, enn tað nakrantíð hevði verið. Bæði landsúrslitið og úrslitið í Suðurstreymi, har Høgni setti met við 1561 persónligum atkvøðum og syrgdi fyri, at flokkurin fyri fyrstu ferð fekk tríggjar valdømisvaldar tingmenn í Suðurstreymi.

Í kjalarvørrinum av valinum spurdist fullveldissamgongan. Høgni gjørdist landsstýrismaður í fullveldismálum, og hann var arkitekturin aftanfyri Hvítu bók og samráðingarnar við donsku stjórnina. Tað gekk ikki, sum Høgni hevði ætlað. Vátt kom í reiðrið millum løgmann og formannin í Tjóðveldisflokkinum, sum móti viljanum hjá løgmanni í februar 2001 bar uppskot um løgtingslóg um sjálvstýri Føroya fólks niðan í Løgtingið. Tá ið hann varð noyddur at taka uppskotið aftur, segði Høgni Hoydal, at hetta var daprasti dagur í hansara stutta politiska lívi.

Hóast samgongan helt fram eftir løgtingsvalið í 2002, so var stevið burtur og fullveldismálið kámað. Eftir samgonguskrædl og løgtingsval í ótíð 20. januar 2004, sum Tjóðveldisflokkurin kom væl burturúr, hava Høgni og Tjóðveldisflokkurin verið uttanfyri.

Høgni er framúr arbeiðssamur, og eingin ivast í góðu evnunum hjá honum at samskifta. Nú er hann andstøðuleiðari samstundis, sum hann røkir fólkatingssessin, ið hann vann í 2001 og endurvann í 2005. Stóri spurningurin er nú, hvussu tað fer at eydnast nú 40 ára gamla floksformanninum at telva soleiðis, at Tjóðveldisflokkurin aftur kann gerast partur av samgongu og harvið at vera við til at seta politiskt úr í kortið.

Høgni livir saman við Hildur Hermansen úr Havnini. Tey eiga trý børn: Sjúrður (1988), Brim (1990) og Helgi (1996).

Høgni skrivaði í 2000, meðan hann var landsstýrismaður, tvær bøkur: Myten om rigsfællesskabet og Frælsi er ábyrgd.

## Advokatfulltrúi í Danmark



Brandur Ellingsgaard, sum er føddur og uppvaksin í Havn, hevur 19. januar 2006 tikið starv sum advokatfulltrúi í advokatvirkinum Hedin í Vordingborg á Suðursælandi í Danmark.

Brandur Ellingsgaard, som er útbúgvin løgfrøðingur frá Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn í 2002, hevur higartil arbeitt hjá tveimum almennum stovnum, Sekretariatet for Arbejdsmarkedsrådet for Storkøbenhavn og Arbejdsmarkedsstyrelsen sum løgfrøðisligur fulltrúi, og eisini á einum arbeiðsloysiskassa fyri sjálvstøðug vinnurekandi.

Brandur Ellingsgaard er 32 ára gamal, giftur og hevur 3 børn, og býr í Dyrlev, einari lítlari bygd tætt við Præstø.

Advokatvirkið Hedin er eitt miðalstórt advokatvirkið í einum donskum provinsbýi, og hevur umframt Brand fýra sakførarar og fimm skrivstovufólk. Virkið fæst við øll sløg av løgfrøðisligum spurningum.

Eigarin Jørn Hedin hevur fleiri ferðir verið í Føroyum í samband við rættarmál fyri føroyingar.

Av serligum áhuga fyri føroyingar viðvíkjandi advokatvirki í Danmark kann nevnast skeyti í samband við keyp av summarhús í Danmark, rættarmál móti donskum mótparti, har rættarstaðið er í Danmark.

Um tygum hava skjøl, sum skulu tulkast eftir danskari lóg, og ikki føroyskari, er tað eisini hent við einum advokati, sum til dagliga arbeiðir eftir danskari lóg, men sum kann málbera seg á føroyskum.

## Andlát og jarðarferðir

**Símin Højgaard, Runavík**, andaðist sunnudagin 26. mars á Landssjúkrahúsinum, 69 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin 29. mars, kl. 17. í Glyvra Kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Símin, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag Móti Krabbameini; konta í peningastovununum.

**Niels Ole Lykke**, ættaður úr **Skive**, búsitandi í Kollafirði, andaðist í gjár 27. mars á Landssjúkrahúsinum, 64 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Ole, kunnu lata eina peningagávu til Føroyskt Cystiks Fibrosifelag; konta í peningastovununum.

**Peter Skaalum**, fyrrverandi skúlastjóri, ættaður úr **Vági**, búsitandi í Mariager, andaðist í heiminum, leygardagin 25. mars, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Mariager kirkju mikudagin klokkan 13.

**Thorleif Askham, Løgstør**, andaðist leygarmorgunin, 78 ára gamal. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13 frá Næsborg Kirkju.

**Óskar Vigfusson av Hafnarfjørðinum**, fyrrverandi formaður í Sjómannasamband Íslands, andaðist 22. mars, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin 31.mars kl. 15 úr Vifilstaðarkirkju.

Móttøka



Í samband við, at Jákup Lamhauge 1. apríl hevur 40 ára starvsdag sum havnarmeistari við Runavíkar Havn, verður almenn móttøka í býráðssalinum fríggjadagin 31. mars frá kl. 15.00 - 18.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin!

Runavíkar býráð

runavik.fo

Sosialurin 341800

**70 ár**

Í dag, 28. mars, verður Sigríður Joensen, búsitandi í Hvannasundi, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum, Karl Joensen, leygardagin 1. apríl frá kl. 17.00.

**Dagurin í morgin**

**29. mars. Jónas**, deyður umleið ár 326. Tikin av døgum í Persiu. Navnið merkir dúgva ella er kanska ein stuttur formur av Jóannes.